Í Skáa 21. apríl 2006

# Ólavsøkuhál.

## Grein um tríggjar bretskar veiðutjóvar – Burwood, Aretic Galliard og Aberdeen Venturer – sum Tjaldrið tók um Ólavsøkumundið í 1977.

**Skrivað hevur John Kjærbo eystan Á**

**Burwood verður kannaður.**
Týsdagin 26. juli kl. 20:00 1977 fór kanningarlið av vaktarskipinum Tjaldrinum umborð á skotska trolaran A 547 Burwood fyri at kanna veiðu og reiðskap.

Trolarin var tá staddur 18 sjómíl norður úr Mykinesi. Tá ið kanningarliðið kom at borði, segði skiparin á Burwood, at tað kom ógvuliga tvørt fyri hjá teimum, at manningin á Tjaldrinum kom at kanna meskar nú, tí hetta var seinasta hálið á túrinum, og um teir skuldu klára at koma heim til flóðina, so var ongin tíð út at geva. Skiparin mælti teimum tí heldur at steðga við meskakanningini, til teir komu aftur næsta túr.

Teir á kanningarliðinum hildu, at hetta ljóðaði løgið, so teir valdu at fara umborð. Trolið var júst komið á dekkið. Eftirlitsmenninir fóru síðani at máta meskarnar. Úrslitið av kanningini vísti, at posi, bellur og millumstykkið høvdu alt ov smáar meskar, 88 mm. í miðal. Minst loyvda meskavídd var 120 mm. Harafturat hevði hann eisini 2 trol umborð, sum ikki stóðu mát. Hetta var lagt fyri skiparan á Burwood, tann 63 ára gamla Alister Nelson.

Vanlig mannagongd er, at skiparin skrivar undir eitt skjal, sum vísir úrslitið av kanningini. Skiparin tók pennin í hondina, hugdi eina løtu niður á skjalið; síðani ripaði hann pennin í dúrkið, leyp til regulatorin, koyrdi fulla ferð á motorin og segði:” We are going home”.

Eftirlitsmenninir skiltu nú, at øði var komin í skiparan, og stíva kenning hevði hann eisini. Nú var at bera skjótt at, um teir ikki skuldu enda í Skotlandi. Teir høvdu VHF`aran hjá sær og kallaðu á gummibátin og bóðu hann koma at borði í stundini. Gummibáturin var bert nakrar heilt fáar metrar frá Burwood, tá ið teir kallaðu á hann, so hann var at borði beinanvegin, og teimum eydnaðust at sleppa í bátin, áðrenn ferð var komin á Burwood.

**Burwood verður jagstraður.**
Klokkan 21:00 er kanningarliðið komið umborð aftur á Tjaldrið. Tá ið gummibáturin er surraður fastur, setir Tjaldrið fulla ferð á motorarnar og byrjar at elta Burwood. Tað var ongin trupulleiki hjá Tjaldrinum at sigla trolarin uppaftur. Burwood siglir um 10 míl, Tjaldrið 15 míl. Trolarin siglir í ein landnyrðing, og Tjaldrið fylgir honum. Skiparin fær boð um, at hann er “arresteraður” og verður biðin um at fylgja við til Havnar. Skiparin á Burvood svarar aftur, at okkurt er galið við VHF sendaranum, og síðan fæst ikki samband við trolaran aftur.

Kl. 21:20 heysar Tjaldrið signalflaggið K og gevur sama boð við floytuni og ljósinum (morsilampuni); samstundis verður kallað alla tíðina á VHF sendaranum. Flaggið K merkir: eg ynski at koma í samband við teg, men hann lætst ikki um vón. Trolarin siglir við fullari ferð; kósin er tann sama, 45 stig (gradir) rættvísandi.

Nú verður signalflaggið L heysað. Tað merkir: steðga tínum skipi í stundini. Samstundis verður kanónin gjørd klár. Ætlanin var ikki at skjóta, men heldur at vísa Burwood, at kanónin var klár. Alt segði tað sama, hann vildi ikki hava nakað samband við Tjaldrið. Um skjótast skuldi, mátti loyvi fáast frá myndugleikunum á landi.

Tá skipini vóru komin eystur um Fugloynna og Burvood hevði sett kós suðuryvir, fekk Tjaldrið boð frá landi, at teir ikki skuldu elta hann longur. Tá hevði Tjaldrið jakstra Burwood í 6 tímar.

**Tjaldrið fingið kanón.**
Tjaldrið hevði fingið politimyndugleika og kanón fyrr um summarið í 1977. Venjingarnar av manningini á Tjaldrinum og Dagstjørnuni - at skjóta við kanónini - vóru byrjaðar um hálvan juni, og fyrsta skotið

var latið av tann 17. juni kl. 16:42. Tríggir mans av hvørjum holdi vóru úttiknir til hetta, báðir stýrimenninir og ein av dekkarunum. Kanóninar, sum Tjaldrið og Dagstjørnan høvdu fingið umborð, vóru loftverjukanónir av Oerlikonslagnum 20 mm., og bera tær uml. 5000 metrar. Ein maður frá donsku verjuni, instruktør Jensen at navni, var umborð á Tjaldrinum í 10 dagar og vandi fólkið í at brúka kanónina.

**Aretic Galliard verður tikin.**

Eftir at Tjaldrið var givið at jakstra Burwood, setti tað kós móti kassa 1 norðan fyri Fugloynna. Tá kemur tað fram á Hulltrolaran H 195 Aretic Galliard.

Kl. 04:45 verður staðfesting tikin av Aretic Galliard, og tað vísir seg, at trolarin er 1,4 sjómíl innanfyri í kassa 1. Aretic Galliard verður nú kontaktaður yvir VHF`aran og biðin um eina staðfesting. Positiónin, sum Aretic Galliard gevur Tjaldrinum, er Enniberg í 241 stig (gradir) rættvísandi. Frástøðan er 23,4 sjómíl, og er hendan staðfestingin tann sama, sum Tjaldrið er komið til.

Tað verður nú gjørt skiparanum á Aretic Galliard greitt, at hann fiskar ólógliga, og verður hann biðin um at hála. Aretic Galliard er av størstu bretsku trolarum. Tað var bert loyvt bretskum trolarum undir 130 føtur at veiða innan fyri ávís øki inn móti føroysku landleiðini. Trolarin hevði bert havt eitt hál, tá Tjaldrið kom fram á hann, 1,4 fjórðing inni í kassa 1. Skiparin fekk boð um at fylgja við til Havnar, og hetta játtar hann beinanvegin. Skipini bæði koma á Havnina kl. 08:30 mikumorgunin 27. juli 1977.

**Aretic Galliard í Føroya Rætti.**

Sama dag kom málið fyri í Føroya Rætti, har skiparin varð ákærdur fyri ólógliga trolveiðu, fyri at hava havt tvey óløglig trol umborð og fyri at hava brúkt ólógligt spell.

Skiparin, tann 43 ára gamli Terence Tresh, viðgekk seg sekan í at hava veitt ólógliga, men hann hevði hildið seg hava loyvi at trola á veiðiøki 1 aftan á hálvan mai. Um tey bæði trolini, sum høvdu 38 mm. meskar, segði hann, at teir høvdu roynt eftir sild við teimum við Sankt Kilda, stutt áðrenn trolarin kom til Føroyar at royna. Hann segði seg ikki vita um reglugerðina, sum segði, at ikki var loyvt at hava trol umborð við smærri meskum enn 120 mm., tá roynt varð undir Føroyum. Sama kvøld fall dómur í málinum.

Skiparin varð dømdur eftir ákæruskrivinum og fekk 120.000,00 kr. í bót. Oppermann dómari segði í eini viðmerking til dómin, at hann ikki metti Terence Tresh skipara at hava gjørt nakað brotsverk , men at hann heldur var eitt offur fyri reglunum, sum galda í hørðu og køldu verð okkara. Tá bótin ikki var størri enn 120.000,00 kr. var ein orsøkin til hetta, at skiparin hevði verið stak beinasamur undir avhoyringini, legði hann aftrat.

**Tjaldrið tekur triðja trolaran.**

Tjaldrið var liggjandi á Havnini til Ólavsøkuaftan. Klokkan 14:30 fór tað frá bryggju og kastaði akker uttan fyri molan, soleiðis at manningin kundi hyggja eftir kappróðri. Kl. 17:00 var ankarið tikið inn, og siglt var suður um Kirkjubønes og norður gjøgnum Vestmannasund og út á Mýlingsgrunnin. Sama kvøldið var Aberdeen trolarin A 472 Milwood kannaður, og har vísti alt seg at verða í lagi.

Ólavsøkumorgun var kanningarliðið umborð á A 431 Starwood, og har var heldur onki at finnast at. Sama dag kl.16:00 var komið fram á A 488 Aberdeen Venturer, sum togaði. Boð vóru givin, at hann skuldi hála, tí eftirlitsmenn skuldi umborð at kanna veiðu og reiðskap.

**Hálaði so hart, at trolið fór til botns.**

Gjørt var eftir boðunum, og vóru eftirlitsmenninir komnir umborð á trolaran, tá lemmarnir komu at borði og vóru loystir úr, men trolið varð hálað so hart upp í rullurnar, at breitlarnir slitnaðu, og trolið fór aftur í havið.

Skiparin á Aberdeen Venturer verður nú biðin um at dreggja eftir trolinum. Hann svarar aftur, at hann ætlar sær ikki at fáa trolið aftur; annars hevur hann ongan dreggjara. Tað var ikki í samsvari við veruleikan, tí eftirlitsmenninir av Tjaldrinum staðfestu, at ein dreggjari var umborð. Tjaldrið hevði ikki myndugleika at geva ordrar um, at trolarin skuldi royna at fáa trolið aftur. Umborð á Tjaldrinum var dreggjarin gjørdur klárur og koyrdur út. Dreggjað var so í 2 tímar uttan úrslit, samstundis sum eftirlitsmenninir kannaðu verandi reiðskap umborð á Aberdeen Venturer. Tá vísti tað seg, at bæði trolini,

sum eftir vóru umborð, høvdu ov smáir meskar. Meðan minst loyvdu trolmeskar undir Føroyum eru - sum fyrr sagt - 120 mm., vórðu meskarnir í trolunum hjá Aberdeen Venturer í meðal 90 mm.

Skiparin var nú biðin um at fylgja við til Havnar, og eftir at hava verið í samband við reiðaran gjøgnum telefonina, játtaði skiparin at fylgja við. Bæði skipini komu á Havnina um midnáttina, Ólavsøkukvøld.

Málið kom fyri í Føroya Rætti fyrrapartin dagin eftir, tann 30. juli 1977. Skiparin, tann 49 ára gamli William Mickey, varð ákærdur fyri at hava trolað við ólógligum troli, og eisini fyri at hava havt ólóglig trol umborð, sum ikki eru loyvd í føroyskum sjóøki.

William Mickey skipari segði, at trolið, sum teir royndu við og mistu, hevði havt lógligar meskar, og at hini bæði trolini við smærri meskum vóru ætlað til Norðsjóarveiðu, har hann seinni ætlaði sær at royna. Skiparin segði seg ikki vita, at tað var ólógligt at hava trol umborð við ov smáum meskum, tá fiskað verður undir Føroyum.

Seinnapart sama dag fall dómurin, og skiparin varð dømdur 10.000,00 kr. í bót fyri at hava havt tvey ólóglig trol umborð. Dómurin førdi eisini við sær, at Aberdeen Venturer, sum áður var dømdur fyri ólógliga veiðu undir Føroyum, misti loyvið at veiða í føroyskum sjóøki.

**<u>Vit venda nú aftur til A 547 Burwood.</u>**

Eftir at Burwood var sloppin leysur av Tjaldrinum tann 27. juli, settu teir beina kós til Aberdeen, har teir komu dagin eftir.

**Var avkoyrdur.**

Alister Nelson skipari møtti í Føroya Rætti tann 16. august 1977. Saman við honum møtti eisini stjórin í troldeildini hjá reiðarínum J. Wood Group, Charles Small.

Skiparin greiddi her frá, at hann eftir 17 ára tænastu í reiðarínum - harav 10 ár sum skipari - varð avkoyrdur, tá hann kom til Aberdeen eftir hendinga í Føroyum, so at hann tískil ikki sá seg føran fyri sjálvur at gjalda nakra bót.

**Sekur, tekniskt sæð.**

Uppá fyrispurning frá dómara Jógvani H. Andreassen viðgekk skiparin, at hann var sekur tekniskt sæð, við tað at hann hevði havt 2 trol við smærri meskum enn 120 mm. umborð, men hann segði seg ikki sekan í at hava gjørt nakað lógarbrot við vilja, tí hann visti ikki, at tað ikki var loyvt at hava trol umborð við smærri meskum enn 120 mm. Heldur ikki visti hann, at teir høvdu trolað við ov smáum meskum.

Alister Nelson geiddi frá, at áðrenn túrurin til Føroya byrjaði tann 17. juli, hevði trolarin roynt í Norðsjónum í 4-5 mánaðir. Hann hevði umframt tey bæði Norðsjóartrolini, sum hava smærri meskar, tikið 2 Føroya-trol umborð, umframt stykkir at bøta við, og sum eisini høvdu nóg stórar meskar.

**Stýrimaðurin setti stykkið í.**

Burrwood royndi á vánaligum botni 18-20 fjórðingar úr landi, hevði góðan fiskiskap men skræddi illa. Kvøldið fyri, sum manningin av Tjaldrinum kom umborð, var trolið aftur skrætt, og skiparin, sum tá hevði verið á brúnni í 45 tímar, tørnaði inn. Í meðan hevði stýrimaðurin skift millumstykkið á trolinum út, og nýggja stykkið hevði teir smærru meskarnir.

Meðan trolað varð aftur, gjørdist fast í botni, og skiparin kom tá uppaftur. Tá hevði hann bert sovið í tríggjar timar.

Tá teir á Tjaldrinum bóðu um loyvi at koma umborð, segði skiparin seg til reiðar at taka ímóti teimum. Hann var tá ikki greiður yvir, at veitt varð við ólógligum troli, og hann hevði eisini hjálpt eftirlitismonnunum av Tjaldrinum við mátingini av meskunum, og kundi hann tí vátta, at meskamátini, sum løgd vórðu fram í rættinum, vóru røtt.

**Skiparin ikki fingið boð.**

Charles Small, sum í 14 ár hevði verið stjóri í troldeildini hjá J. Wood Group, vitnaði, at hann fyrst umleið 20. juli sama ár hevði fingið kunnleika um føroysku fyriskipanina, sum millum annað ásetir, at ikki er loyvt at hava trol umborð við smærri meskum enn 120 mm. Reiðaríðið fær vanliga boð um broytingar í fiskireglunum í føroyskum sjóøki gjøgnum bretsku stjórnina.

Roynt varð beinanvegin at fáa boðini til so nógvar av trolarunum hjá reiðarínum sum gjørligt, men tað er møguligt at Burwood, sum var farin avstað 17. juli ikki fekk tey, segði Charles Small.

**Skulu kenna reglunar.**
Ákærarin, Frantz Cohn, segði, at tað áður hevði verið frammi, at bretsku skiparanir ikki vóru kunnigir við reglurnar, sum vóru galdandi fyri fiskiskap undir Føroyum. Tað kundi kanska sigast at vera harmiligt, at samskiftið svíkti, og upplýsingar um broytingar ikki rukku nóg skjótt fram, men reglur eru og hava longi verið í gildi, og ákærarin legði dent á, at teir, sum veiða undir Føroyum, eiga at verða vitandi um tær reglur, sum eru galdandi her.

Viðvíkjandi straffásetingini vísti ákærin til dómarnar hjá Aberdeen Venturer og Valia og helt, at skiparin á Burwood, sum hevði ábyrgdina av lógarbrotinum, ikki átti at fáa minni enn 20.000,00 kr. í bót.

**Hevði víst góðan vilja.**
Verjin, Halgir Winther Poulsen, segði, at tað ikki vóru nakrir brotsmenn og veiðutjóvar, sum møttir vóru í rættinum í dag. Vit hava frá vitnum fingið at vita, at reiðaríið ikki visti um reglurnar, at trol við ov smáum meskum ikki máttu verða umborð.

Tað var heldur eingin grund til at halda, at skiparin fór at seta sítt tilverugrundarlag upp á spæl - tá ein góður túrur var um at vera liðugur - við at fiska eitt samdøgur við ólógligum troli; tí áttu vit at trúgva honum, tá hann segði, at hann ikki var vitandi um, at pettið við ov smáum meskum var sett undir.

Reiðaríið hevði víst góðan vilja til at fáa mál uppklárað í Føroya Rætti fyrr, og eisini hesaferð við at senda fólk higar. Hetta talar fyri, at tað ikki er nakað sjórænarafelag, vit hava við at gera, segði verjin.

Hann meinti, at ein bót upp á 15.000,00 kr. var hóskandi. Hetta lá mitt ímillum hinar báðar dómarnar, har 20.000,00 kr. var givið í bót fyri at nýta ólógligt trol, og 10.000,00 kr. varð givið í bót fyri bert at hava ólógligt trol umborð.

**Reglunar lógliga kunngjørdar.**
Jógvan H. Andreassen rættarassessor, sum hendan dagin sat í dómarasætinum segði, at tað er prógvað, at trolarin hevði 2 trol umborð, sum vóru ólóglig eftir føroyskari lóg, og tað frítekur ein ikki fyri straff, at viðkomandi ikki kennir lógareglunar. Bæði føroyingar og fremmandir, sum fiska við Føroyar, hava skyldu at seta seg inn í reglurnar. Lógarreglunar, sum her er talan um, eru kunngjørdar lógliga á vanligan hátt og eru tí bindandi bæði fyri føroyingar og útlendingar.

Eitt annað er, at eftir revsilógini kann ein verða revsaður fyri at vísa óansni. Sum ábyrgdarhavandi á trolaranum hevur skiparin ábyrgd av gerðini, sum her er farin fram, sjálvt um hann ikki visti, at ólógligt trol var nýtt, segði dómarin.

Avgerðin hjá rættinum má verða, helt dómarin fram og vendi sær til Alistair Nelson skipara: at tygum eru skyldugur í hesum og sum soleiðis hava revsing uppiborna. Bótin verður av somu stødd sum hjá skiparanum á Velia 20.000,00 kr.; í øðrum lagi heftið í 20 dagar og at gjalda sakarmálskostnaðin. Taka partarnir við hesum, verður dómur ikki avsagdur.

Ákærarin tók við rættaravgerðini, og aftaná at hava tosað við reiðaríið tók skiparin eisini við avgerðini.

Reiðaríið átók sær at gjalda bótina vegna skiparan innan 15 dagar og harafturat at rinda 1000,00 kr. í ómaksløn til verjan.

Bretski konsulin, Axel Mortensen, var tolkur undir sakarmálinum, og fyri hetta fekk hann 300,00 kr., sum vórðu goldnar úr statskassanum, hagar bótin fer.

**Fleetwood trolarin FD 220 Velia.**
Trolarin Velia, sum dómarin vísir til, var kannaður av Tjaldrinum tann 10. mars 1977.

Málið byrjar í Fuglafirði. Tað var vrakarin í Fuglafirði, sum varnaðist, at Velia hevði eitt trol við ov smáum meskum, tá trolarin lá inni á Fuglafirði. Tá vrakarin var farin í land at boðsenda politinum, fór trolarin avstað, og síðani vórðu boð send til Vaktar- og Bjargingartænastuna, sum boðaði Tjaldrinum frá, og bað teir umborð hava eyguni við trolaranum.

Tjaldrið kom fram á FD 220 Velia 12 fjórðingar norður úr Kallinum kl. 17:15. Tjaldrið gevur trolaranum boð um at steðga, so at eftirlitsmenn kundu koma umborð at kanna trolið. Velia steðgar ikki í fyrsta umfari. Kl. 17:35 minkar Velia um ferðina, og gummibáturin av Tjaldrinum verður settur út, og

kanningarliðið fer umborð á trolaran. Tá ið eftirlitsmenninir koma umborð, síggja teir, at posin verður beindur burtur, og nýggjur posi verður hivaður upp á dekkið.

Manningin á Tjaldrinum tekur tann gamla posan upp úr fiskakassanum, har ið hann var burturbeindur. Tað sást týðiliga, at hesin posin hevði verið nýttur fyri stuttari tíð síðani, av tí at fiskur stóð í meskunum. Meskarnir í posa og millumstykki verða kannaðir og funnir ov smáir. Teir vóru 90 mm. tvs. 30 mm ov smáir.

Tá kanningarnar vóru lidnar, sýtti skiparin at skriva undir kanningarfrágreiðingina, og hann sýtti eisini at fylgja við til Havnar, og tí noyddist Tjaldrið at lata trolaran halda leiðina fram.

Skiparin á Valia kom tó seinni til Føroyar og var dømdur í Føroya Rætti 20.000,00 kr. í bót.

Heimildir:

Dimmalætting 1977
14 Septembur 1977
Skipsdagbøkur av Tjaldrinum 1977
1 stm á Tjaldrinum Pole Mikkelsen.